


www.oljan.fo

**Jan Müller** 17 - 11 - 2011

# DF vil hava meiri olju úr Norðsjónum

Danski Fólkaflokkurin, sum tók undir við avtaluni, sum stjórnin gjørdi við Mærsk í 2003 um oljuna í Norðsjónum, tekur nú undir við at endurskoða avtaluna fyri at vita, um tað ber til at fáa fleiri oljumilliardir í ríkiskassan. Men treytin hjá flokkinum er, at broytingarar skulu ikki tyngja feløgini, sum taka oljuna upp úr undirgrundini, sigur fíggjarpolitiski framsøgumaðurin hjá flokkinum, Kristian Thulesen Dahl, við danska kringvarpið. -Vit fara ikki at taka undir við nøkrum, sum skal gerast, tí onkur ikki unnir feløgunum vinningin so sum at hækka skattin úr 60 í 62 prosent. Men vit eru til reiðar at kanna, um tað ber til at skrúva onkrar knøttar, sum kunnu gera, at vit fáa meiri olju upp úr undirgrundini, tí tað hevði gagnað bæði feløgunum og ríkiskassanum, sigur Kristian Thulesen Dahl við DR. Sjálvur heldur hann, at tað almenna kann økja íløgurnar í betri tøkni.

